

# Amerikanska lættoljan kostar nú meir enn Norðsjóvaroljan

**Jógvan Hugo Gardar**

23.12.2015 - 23:07

Oljan.fo

Í kvøld kostar amerikanska lættoljan WTI 37,83 dollarar fyri fatið, meðan Norðsjóvaroljan Brent kostar 37,72 dollarar fyri fatið. WTI-oljan hevur vanliga verið munandi bíligari enn Brent-oljan, og til tíðir hevur munurin verið omanfyri 20 dollarar.

Oljuprísurin hevur hækka javnt í allan dag, men WTI-oljan hevur økt meir enn Brent. Oljuprísurin fekk ferð á seg tá tøl komu úr USA sum vístu at oljugoymslurnar har ikki eru so stórar sum ein hevði mett frammanundan.

Heimsins oljugoymslur eru tó framvegis á tremur, og tað skulu vera meir enn 80 ár síðani at oljugoymslurnar vóru so stórar á jólum.